# Deja Vu spæla tað sama umaftur

**Góða úrslitið í føroysku finaluni í The Global Battle Of The Bands hevur fingið bólkin at halda fast í somu spæliskrá í heimsfinaluni**

GBOB
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fi*



*Rógvi og Flóvin brúktu mánakvøldið í London til at síggja eitt sindur av London, m.a. eitt víðagitið graffitti listaverk í Camden*

Deja Vu er í góðari venjing, tá bólkurin í kvøld fer á pall í London Astoria, í GBOB finaluni. Seinastu dagarnar hevur Deja Vu verið í venjingarlegu í Keypmannahavn, har bassleikarin Rógvi býr.

- Vit spæla, tey somu løgini, sum vit spældu í føroysku GBOB finaluni, greiðir Rógvi frá, tá vit hitta hann og sangaran Flóvin Viderø í London í gjárkvøldið.

Framførslan av løgunum Wake You Up og Reckless var somikið sannførandi í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, at bólkurin vann á Marius, sum í fjør fekk eitt deilt 6. pláss í heimsfinaluni. So hetta tykist sum ein skilagóð avgerð.

Flóvin, Rógvi og vinmaðurin Rólant brúktu kvøldið í London til eitt sindur av sight seeing, meðan restin av limunum, ið vóru komnir vegin fram hvíldu seg heima á hotellinum. Teir tykjast at hava ein undurfullan avslappaðan hugburð um finaluna. Ringt er at veruliga avlesa hvørjar kenslurnar eru, men tað tykist, sum um bólkurin hvílur í sær sjálvum. Seinasta árið hevur Deja Vu spælt nærum hvørt vikuskiftið, antin sum bólkur ella sangararnir báðir saman. Teir hava stóra rutinu, so tað er veruliga ikki so stór orsøk til alt ov nógv hóvasták.

Stóra rutinan er eisini nakað, ið onkur av hinum tónleikarunum í GBOB finaluni hevur lagt til merkis. Tá vit hitta limirnir í íslendska bólkinum Perla, spyrja teir í øllum førum dúgliga um stóru rutinuna hjá Deja Vu. Perla er ein spildur nýggjur bólkur, teir hava spælt saman síðan mars, og GBOB finalan verður 5. framførslan hjá bólkinum. Teir eru tó allir royndir tónleikarar, og kunnu við sínum progressiva rokki gerast ein jalig uppliving, í øllum førum eru teir stak dámligir.

## Flogræðsla ávirkar føroysku luttøkuna

GBOB
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Føroyski GBOB fyriskiparin og trummuleikarin í Deja Vu eru somikið illa raktir av flogræðslu, at teir ikki tordu á flog til London.

Jón Tyril føroyski fyriskiparin av GBOB er eftir í Føroyum, nú Deja Vu eru farnir til London at kappast um heitið vinnari av Global Battle Of The Bands, $100.000 og eini heimsumfatandi konsertferð. Jón greiður frá, at orsøkin til, at hann ikki er í London, hvørki er manglandi hugur ella ov stór arbeiðsbyrða í sambandi við fyriskipan av G!Festivalinum, men flogræðsla. Jón var staddur í London í oktober, tá flogfarið hjá Atlantic Airways fórst í Stord í Noregi, og fleyg til Føroyar eftir dagin eftir vanlukkuna. Á ferðini heim kendi Jón fyrstu ferð ræðsluna fyri at flúgva, og henda ræðsla var sera ring. Síðan tá hevur Jón arbeitt við at koma seg yvir ræðsluna og hevði til síðstu løtu ætlanir um at fara til London. Men tá fráferðardagurin upprann, var ræðslan tíanverri enn somikið ring, at hugsingur ikki var um at fara á flog, tí settist Jón aftur.

Men Jón er ikki einasti limur í ferðalagnum, ið ikki vildi á flog. Eisini trummuleikarin í Deja Vu, Rúni Højgaard settist aftur. Hetta hendi tó ikki í Føroyum sum hjá Jón men í Kastrup. Deja Vu hava seinastu dagarnar vant til finaluna í Danmark. Rúni valdi tí ístaðin at fara við tokið og skipið til Onglands og kom til London í morgun, meðan restin av bólkinum kom í gjár.

Tá vit fingu orð á Jón Tyril í telefonini sat hann við hús í Gøtu og lurtaði á alnetinum eftir teimum 24 bólkunum, ið Deja Vu skulu kappast við. Hóast hann ikki er í London eru vónirnar um eitt sannførandi føroyskt úrslit góðar:

- Um eg skal døma eftir demo-upptøkunum, ið bólkarnir hava lagt á netið, so eru vónirnar góðar, sigur Jón og heldur fram

- Demoin hjá Deja Vu er nógv meira professionell enn flest allar hinar.

## Sosialurin er í London

Í sambandi við, at finalan í The Global Battle Of The Bands verður hildin í The London Astoria í kvøld, er Sosialurin í London. Í blaðnum í morgin verður frásøgn frá finaluni, har vit frætta hvussu leikur fer, tá Deja Vu kappast við bólkar úr 24 øðrum londum.

Vónin er, at Deja Vu eins og Marius verður millum teir bestu 6, ið eru teir bólkarnir, ið man fær at vita støðuna hjá. Einki verður sagt, um hvør er á 7.-25. pláss, so tí er at vóna at bólkurin verður millum teir seks fremstu. Deja Vu hevur í føroysku finaluni megnað at vunnið á finalistinium í fjør Marius, tí eiga vónirnar at vera rættiliga góðar um, at bólkurin megnar at fáa eitt gott úrslit.

**nud**

# Deja Vu verður 6. bólkur á pallin

**Lutakastið um raðfylgjuna, ið bólkarnir spæla á GBOB finaluni í London, hevur givið Deja Vu eitt 6. pláss, væntandi er hetta eitt sera gott pláss**

GBOB
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Lutakastið um raðfylgjuna í GBOB heimsfinaluni endaði væl fyri Deja Vu. Bólkurin verður 6. bólkur á pallin í kvøld. Hetta kunngjørdu fyriskipararnir á fundi fyri luttakararnar í gjárkvøldið. GBOB finalan verður hildin í víðagitna spælistaðnum mitt í London, The London Astoria. Hon fer av bakkastokki umleið kl. 19.00 og Deja Vu fer eftir ætlan á pallin kl. 20.00. Tá skuldu áskoðararnir verið hitaðir upp, og samstundis eru oyrini hjá áskoðarum og dómarum enn rættiliga frísk. Tað var ein sannroynd í fjør, at tá síðstu bólkarnir fóru á pallin var bikarið hjá áskoðarunum langt síðan fult. Tí er tað gleðiligt, at Deja Vu ikki endaði millum síðstu bólkarnar.

Um miðnáttarleitið fer GBOB vinnarin í fjør Kopek úr Írlandi á pallin at framføra nøkur løg, meðan dómsnevndin ger av hvørjir bólkar manna tey fremstu seks plássini.



*Limirnir í Deja Vu vóru vælnøgdir við lutakastið*

Raðfylgjan, ið spælt verður í kvøld er hendan:

| Klokkan | Bólkur | Land | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 19.00 | Silver | Niðurlond | 21.36 | Bizali | Ongland |
| 19.12 | House Of Ghosts | Serbia | 21.48 | Crescendo | Teiland |
| 19.24 | Cody | Danmark | 22.00 | De Ja Groove | Avstralia |
| 19.36 | Svet Boogie Band | Hvíta Russland | 22.12 | Senit | Noregi |
| 19.48 | Sixteenth Solid Spread | Spania | 22.24 | Bolshoy Kush | Russland |
| 20.00 | Deja Vu | Føroyar | 22.36 | Heavy Mojo | USA |
| 20.12 | Amplify | Týskland | 22.48 | Millenium | Moldova |
| 20.24 | Blind Friday | Írland | 23.00 | Estrella | Skotland |
| 20.36 | Perla | Ísland | 23.12 | Lonehill Estate | Suður Afrika |
| 20.48 | Nuumak | Italia | 23.24 | Etwas Unders | Ukraina |
| 21.00 | Flare Odds | Japan | 23.36 | Ninja Pigeon | Wales |
| 21.12 | The Moving Pictures | Svøríki | 23.48 | The Broken Hearted | Kanda |
| 21.24 | Electric Co. | Meksiko | 00.00 | Kopek | Vinnari í fjør, Írland |